gult cyan magenta svart



## ÚT AT KOYRA

# Mitsubishi Carisma DI-D

**Mitsubishi, ið eru kendir sum slóðbrótarar innan bensinmotorar við beinleiðis innspræning, hava nú eisini gjørt ein nýggjan turbodiesel motor við commonrail tøkni**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Mitsubishi Carisma DI-D hevur nýggja turbodiesel motorin. DI-D stendur fyri Direct Injection Diesel, og fáast við ávikavist 102 hk og 115 hk. Hesir motorar eru sera orkusparandi og trekkja væl. Tað er ein nútímans motortøknifrøði ið skilir DI-D motorin frá vanliga dieselmotorinum, við mekaniskari innspræning uppá 150 bar. Hetta er ein fult elektronisk innspræningsskipan, sum ger tað møguligt at stýra innspræningartíðini og mongdini av brennievni heilt neyvt. Nýggja skipanin arbeiðir við einum trýsti uppá 1800 bar í einum felags føðirøri, ið er meira enn 10 ferðir so nógv sum í vanliga dieselmotorinum.

### Ríkiligt av kraft

Fyrimunurin við høga trýstinum er, at støvingin af brennievninum verður so fín, at drívmegin og orkusparingin verður munandi betri. Motorurin við 102 hk hevur so góðan snúningsmátt, at ikki er neyðugt at skifta gear so ofta sum annars. Bilurin er kvikur, trekkir væl og hevur ríkiligt av kraft til yvirhálingar.



*Mitsubishi kemur nú við nýggjum dieselmotori*

MITSUBISHI MOTORS

**Mitsubishi Carisma 1.9 DI-D**

| | |
|---|---|
| Motorurin | 4 syl. 1,9 litur 102 hk |
| 0-100 km/t | 11,9 sek |
| Oljunýtsla | 8,2 km/l |
| Dekkstødd | 195/65-15 |
| <u>Stødd og vekt</u> | |
| Longd | 447,5 cm |
| Breidd | 171,0 cm |
| Hædd | 140,5 cm |
| Eginvekt | 1275 kg |
| Totalvekt | 1800 kg |
| Prísur | kr. 207.500,- |

# Mercedes-Benz C 220 CDI


*Tríggjar útgávur eru at velja ímillum, Classic, Elegance og Avantgarde, og listin yvir útgerðina er næstan óendaligur*

*Mynd: Jens K. Vang*

**Mánadagin kom fyrsti Mercedes-Benz C av nýggja modellinum til landið. Hetta er ein sera væl útgjørdur Mercedes C 220 CDI, í Elegance útgávuni**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Eftir at hava arbeitt í fýra ár og gjørt íløgur uppá millum 11 og 12 milliardir, hevur tað eydnast at gera nakað av tí besta, sum komið frá Mercedes verksmiðjuni í Stuttgart. Hóast bilurin minnir um forgangaran, er hetta ein heilt nýggjur bilur, ið er rúmligari innan og hevur størri viðførisrúm. Ein onnur broyting til tað betra, er at bilurin nú hevur tannstongstýring, sum ger at hann er sera góður og stúttur at koyra.

### Væl útgjørdur

Tríggjar útgávur eru at velja ímillum, Classic, Elegance og Avantgarde, og listin yvir útgerðina er næstan óendaligur. Standard útgerðin er til dømis ABS bremsur, ARS antispinn, BAS bremsuassistent, APS elektronisk stabilitetskipan, el-síðurútar, kassa til fyrstuhjálp, sjey hátalarar. Umframt airbag framman og í síðunum, hevur hann eisini windows airbags, ið verja høvdið við ein síðusamanstoyt.

Mercedes-Benz

**Mercedes C 220 CDI**

| | |
|---|---|
| Motorurin | 4 syl. 2,l litur 143 hk |
| 0-100 km/t | 10,3 sek |
| Oljunýtsla | 16,1 km/l |
| Dekkstødd | 195/65-15 |
| <u>Stødd og vekt</u> | |
| Longd | 452,6 cm |
| Breidd | 172,8 cm |
| Hædd | 142,7 cm |
| Eginvekt | 1520 kg |
| Totalvekt | 2000 kg |
| Viðførisrúm | 455 litrar |

## Ford íløgur í Norra



Ford setur eina milliard krónur í norsku el-bilaverksmiðjuna Think. Framleiðslan verður framhaldandi í Aurskog, uttanfyri Oslo. Næsta ár kemur ein størri Think bilur til amerikanska marknaðin.

*Kelda: Bilen Motor & Sport*

## Ísfrían framrút



Amerikanska fyritøkan Torvec, er í ferð við at gera ein framrút, sum ikki frystur til um náttina. Teir siga at veikt statiskt elektrisitet ger at rúturin frystur. Á ein næstan ósjónligan hátt, ber til at nevtralisera løðingina, so rúturin ikki frystur.

*Kelda: Bilen Motor & Sport*

## Chrysler við undirskoti



Tað koma at ganga upp til fýra ár, áðrenn kreppurakta Chrysler bilverksmiðjan kemur at geva pengar, sigur Daimler Chrysler stjórin, Jürgen Schrempp. Í ár verður undirskotið umleið 10 milliardir krónur.

*Kelda: Bilen Motor & Sport*

gult cyan magenta svart

ítróttur

Nr. 67 • hósdagur • 5. apríl 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Borðtennis hjá ÍSB

**Fyri fyrstu ferð hevur ÍSB skipað fyri borðtenniskapping**

ÍSB
*Tíðindaskriv*

Hóskvøldið 29. mars skipaðu ÍSB og høvuðsstuðul tess, Føroya Lívstrygging, á fyrsta sinni fyri FM-kapping í borðtennis.

12 luttakarar vóru við í kappingini, og kappast varð í trimum bólkum. Rørslu- og menningartarnað kappaðust hvør sær. Støðið í kappingini var rættiliga høgt, og eftir kappingina segði Egga Jenen, formaður í ÍSB, at um leikararnir halda áfram, so er ikki óhugsandi, at ÍSB fer at taka lut í norðurlandameistarakapping í borðtennis um eitt ella tvey ár.

Úrslitini í kappingini vórðu annars hesi.

**Bólkur eitt**

| navn | heimstaður | stig |
|---|---|---|
| Jógvan Jákup Høj | Tórshavn | 14 |
| Jákup Eli Joensen | Sumba | 10 |
| Júst í túni | Toftir | 8 |
| Jørgen á Vollanum | Miðvágur | 6 |
| Theodor Esmar Hansen | Kollafjørður | 2 |
| Øssur Guðmundsson | Tórshavn | 2 |

**Bólkur tvey**

| | | |
|---|---|---|
| Unn Mortensen | Tvøroyri | 12 |
| Jana Sørensen | Tórshavn | 2 |

**Bólkur trý**

| | | |
|---|---|---|
| Jónsvein Petersen | Haldarsvík | 10 |
| Atli Skaalum | Tórshavn | 8 |
| Haldur Hansen | Runavík | 6 |
| Dánial Jákp Djurhuus | Strendur | 0 |



*Hesir vunnu heiðursmerki í bólki trý, rørslutarnaðir menn: Haldur Hansen, Jónsvein Petersen og Atli Skaalum*

## HM-fótbóltur á skíggjan

**Eftyir at tað leingi hevur sæð svart út, eydnaðist tað loksins hjá almennu donsku rásunum at fáa rættindi at senda HM-fótbólt komandi summar**

SOFAFÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Eftir langar og drúgvar samráðingar, eydnaðist tað týsdagin teimum báðu donsku rásunum, TV2 og DR at tryggja sær rættindini til at senda frá komandi HM-kapping í fótbólti.

Tað hevur annars leingi ligið í luftini, at tað ikki fór at eydnast teimum báðu stóru rásunum at fáa rættindini, hóast eitt ES-direktiv ásetur, at ítróttahendingar av stórum tjóðskaparligum týdningi skulu kunnu síggjast av øllum landsins íbúgvum. Hetta hevði nevnliga merkt, at tær báðar støðirnar bert høvdu fingið rætt til at sent teir dystir, har Danmark spælir, umframt seinastu umførini í HM-kappingini.

Avtalan, sum nú er fingin í lag, er gjørd í samstarvi við svenska STV og norska NRK.

Hetta merkir so samstundis, at vit í Føroyum fáa møguleikan at fylgja við, tá farið verður ígongd við HM-kappingina, tí SVF fær samsent við tær báðar donsku rásirnar.

## Gallaveitsla í flogbólti

**Flogbóltssambandið ferð komandi leygarkvøld 7. Apríl at skipa fyri stórari Gallaveitslu í Havn fyri leikarum, nevndum og øðrum**

FLOGBÓLTUR
*Tíðindaskriv*

Ætlanin var ikki at skipa fyri hesum í ár, men nógv hava heitt á FBF um at skipa fyri hesum, og hetta verður nú gjøgnumført.

Á skránni verður millum annað val av besta:

- Álopsleikara
- Blokkleikara
- Verjuleikara
- Hevara

Eisini verða ársins leikarar og ársins stjørnuskot kosin. Hesi fáa steyp til ognar.

Tað verða meistaradeildarleikararnir hjá ymsu feløgunum, sum skulu atkvøða um, hvørjir teir einstøku leikararnir vera.

Góður matur verður til matna við trimum rættum eins og morgunmatur verður seinni út á náttina, eftir at dansurin er byrjaður.

Hetta er fyrstu ferð at hetta tiltak verður roynt innan flogbóltin, og vónandi verur hetta eins væleydna sum veitslurnar hjá hondbóltinum og fótbóltinum.

# Hondbóltsveitsla í Vestmanna

**Hondbóltsleikarar í Vestmanna hava nóg mikið at fegnast um, tá kappingarárið er lagt aftur um bak, og veitslurnar til hetta endamál tróta heldur ikki**

GALLAVEITSLA
*Jákup Mørk*

Tað eru nú tvey ár liðin, síðani fyrstas gallaveitslan fyri hondbóltinum varð hildin, og einki er at ivast í, at hetta hevur verið eitt væl eydnað tiltak.

Ikki bara hevur hetta verið ein afturvendandi táttur síðani fyrstu veitsluna, men eisini hava aðrar ítróttagreinar tikið táttin upp, sum eitt slag av endabresti fyri kappingarárið.

### Í Vestmanna

Tí er sjálvsagt, at gallaveitslan aftur verður í ár, men í mun til undanfarin ár verður hon í ár hildin í Vestmanna, har føroyameistararnir hjá bæði monnum og kvinnum halda til.

Umframt, at veitslan líka sum markerar endan á kappingarárinum, er hetta eisini staðið, har ársins leikarar, venjarar og dómarar verða avdúkaði. Undanfarin ár hevur hetta verið gjørt eftir einari atkvøðugreiðslu millum leikararnar, men í ár er hendan mannagongd broytt nakað.

Hesa ferð verða tað fimm umboð fyri fjølmiðlararnar, sum saman við venjarunum hjá ymsu feløgunum og einum leikara úr hvørjum liði, sum skulu gera av, hvørji kunnu rópa seg ársins, tá kappingarárið er lagt væl og virðiliga aftur um bak.

Íalt skulu 15 virðislønir latast, og eru hesi: Ársins leikari, - málskjútti, - málverji, - verjuleikari, - venjari, - áleypari og – stjørnuskot. Fyri hesar bólkar er galdandi, at kvinnur og menn verða kosin hvør sær. Seinasta virðislønin verður latin til ársins dómarapar.

Gallaveitslan verður hildin mikudagin komandi, og roknast kann við, at hópin av leikarum, venjarum og dómarum fara at nýta høvi til at takka hvørjum øðrum fyri kappingarárið, sum um tríggjar dagar er av.